

# Bue og Pil kanska sjálvstøðug útbygging

Deil:



**Jan Müller**

14.07.2014 - 17:46

Oljan.fo

Tað, sum er funnið á leiðunum Pil og Bue, vísir seg nú at vera so mikið nógv, at ein sjálvstøðug útbygging kann vísa seg at blíva fíggjarliga lønandi.

Fyrr í ár gjørdu VNG, Spike, Faroe Petroleum og Rocksource tað størsta fundið higartil á Pil-leiðini, sum er á Halten-økinum í Noregshavinum. Tá varð tosað um, at vónirnar um at finna olju á grannaleiðini Bue, vóru góðar, og nú um dagarnar boðaðu feløgini frá, at royndarboringin á leiðini var væleydnað.

Í sama viðfangi hava feløgini boðað frá, at metingin fyri leiðirnar er størri enn fyrr hildið. VNG sigur, at metingin fyri Pil liggur millum 72 og 172 milliónir tunnur av olju og ikki 50

og 172 milliónir, sum felagið metti frammanundan. Tann nýggja metingin hjá Faroe Petroleum er, at millum 80 og 200 milliónir tunnur av olju eru í Pil og Bue.

Øyvind Hagen hjá ABC Sundal Collier sigur, at eru meiri enn 150 milliónir tunnur í einum fundi, kann tað løna seg fíggjarliga at útbyggja leiðina. Hinvegin kunnu tað vera umstøður, sum gera, at 100 milliónir tunnur kunnu vera grundarlag undir einari sjálvstøðugari útbygging, sigur hann.

Tað verður kortini ikki enn, at feløgini í Bue- og Pil-samstarvinum fara at taka støðu til eina møguliga útbygging. Atle Sonesen, stjóri í VNG Norge, sigur við Aftenbladet, at úrslitini av leitiboringum næsta ár verða avgerandi fyri, hvør útbyggingarloysn verður vald.

VNG-stjórin dylur ikki fyri, at feløgini vænta at finna uppaftur meiri á teimum báðum leiðunum, og tí hava tey gjørt av at bora tveir brunnar afturat næsta ár.